## DAGSINS MEINING

# Politisk ósemja um neyðloysn

- Hvat er henda samgongan í grundini samd um? Henda spurningin setti óivað mangur sær sjálvum mikudagin. Tá kom undan kavi, at Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin heldur ikki eru samdir um ætlanina at lata pensjónistar leiga íbúðir og kømur út skattafrítt.

Fólkaflokkurin - bæði løgtingsmenn og býráðspolitikkarar - hava talað fyri at lata húsaeigarar sleppa undan at geva leiguinntøkur upp í skatti. Hetta skal galda fyri øll. Hinvegin hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum boðað frá, at hann fer at leggja eitt uppskot fram, sum gevur pensjónistum heimild at leiga út uttan at geva leiguinntøkuna upp sum skattskyldug inntøka.

Men mikudagin boðaði Fólkaflokkurin frá, at hann tekur ikki undir við uppskotinum. Og í sínum lagi svaraði Karsten Hansen aftur, at tekur Fólkaflokkurin ikki undir við uppskotinum, so tekur hann uppskotið aftur. V.ø.o. eru hesir góðu politikkarar ikki búnir til tað politiska arbeiðið, sum fyrst og fremst er at finna semjur um ymisk áhugamál.

Endamálið við uppskotinum - ella tonkunum - er fáa fólk at leiga út íbúðir og kømur, sum kanska standa tóm. Hetta, tí íbúðaneyðin í høvuðsstaðarøkinum er katastrofal. Hvørki hetta ella undanfarin landsstýrið hava av álvara vilja ført ein íbúða- ella bústaðarpolitikk. Og hetta landsstýrið hevur so snorksovið, hóast øll tekin vóru í sól og mánað um, at fólk fóru at streyma til landið aftur. Serliga, um ein oljuvinna fór at gera innrás.

Hetta verður so gjørt fyri kanska at taka broddin av teimum ringastu avleiðingunum, hóast tað ikki loysir tann stóra trupulleika, sum samfelagið hevur rent seg í, tí øll, sum koma aftur til Føroya, vilja búseta seg í Havnini. Í staðin fyri at flokkar nú fara at keglast um eitt uppskot, sum ikki loysir nakra trupulleika, áttu landsstýrismenninir, sum varða av hesum øki, at sett seg niður og komið við nøkrum tonkum um, hvussu vit skipa ein veruliga íbúða- og bústaðarpolitikk.

Karsten Hansen hevur ferð eftir ferð sagt, at hann er sinnaður at løggeva soleiðis, at leigarar og eigarar verða javntstillaðir. Men tað veða teir hvørki eftir hesum uppskoti, ella eftir tonkunum hjá Fólkaflokkinum. Líka mikið, hvønn veg vit hella, so kunnu vit bara staðfesta, at tann, sum frammanundan fær rentustuðul, ella hevur heimild at fáa hann sum húsaeigari við sethusalánum, eisini skal sleppa undan at geva leiguinntøku upp í skatti V.ø.o. Honum sum eigur, skal verða givið. Góður Fólkaflokspoltikkur! Ein panikkloysn, sum miðjar meiri ímóti at geva fólki at fáa ta fatan, at nú kunnu tey sleppa undan at gjalda skatt fyri eina inntøku, enn at loysa ein samfelagsligan trupulleika. Og hvør rindar? Jú, leigarin, tí sethúsaeigarin fær bæði rentustuðul og skattafría leiguinntøku!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Landsstýrið valt kós, komandi má venda ella kollsigla

**Líggjas Høgnesen**



Tá úrslitið av fólkatingsvalinum var greitt, stóð ein ikki sørt spyrjandi. Fólkaflokkurin hevur í trý ár breggjað sær av skilagóðum fíggjarpolitikki og góðum vinnulívspolitikki. Løgið at fólkið ikki virðir hetta arbeiði meira enn sum so. Hví kann ein spyrja.

**Sjúka fólkaflokshugsjónin**

Fólkaflokkurin hevur havt vinnumál um hendi. Hvat hevur hann fingið av skafti. Jú, hann var um at geva norðmonnum alivinnuna. Í síðstu løtu var landsstýrismaðurin í vinnumálum steðgaður. Somuleiðis hevur Fólkaflokkurin megnað at sorla almennar stovnar, koyrt stjórar, skapt klandur og ótryggleika á stovnunum. Endamálið er eittans – Privatisering. Tann vitan, ið gjøgnum nógv ár er uppbygd á hesum stovnum, verður við øgiligari ferð niðurbrotin, tí starvsfólk siga upp ella verða søgd úr starvi. Tað er nógv, ið bendir á at settir stjórar hava fingið til uppgávu at grenja sum mest um, hvussu ringt tað er at leiða ein almennan stovn. Eg kann nevna 2 dømi. Posthúsverkið og Strandferðslan. Hvussu ofta hava stjórarnir á hesum stovnum verið í fjølmiðlunum og kært sína neyð. Nógv er sum bendir á, á stjórin í Føroya Banka er farin upp í fólkaflokskórið. Aðrir stovnar eru eisini í kórinum, men lat tað liggja. Fólkaflokkurin hevur hóreiggjað sær uttan íblanding frá Tjóðveldisflokkurin, ið hevur tikið høgrapolitikkin til sín við húð og hár.

**Tjóðveldispropaganda**

Vitleys peningagirnd skapar einki land. Tað eigur Tjóðveldisflokkurin eisini at skriva sær aftan fyri oyrað. Høgravendingin og harðrenda støðan yvir fyri lønmóttakarunum kemur at kosta Tjóðveldisflokkinum dýrt til komandi løgtingsval. Tjóðveldisflokkurin fer uttan iva at nýta oljuna í valstríðnum, men veruleikin er at oljan kemur ikki at loysa blokkin av. Í øllum førum ikki tey komandi 20 árini. Ístaðin fyri at føra politikk fyri borgaran, hava tjóðveldisfólk biðið um eitt stríð, ið er til onga nyttu. Tað veruliga, føroyingin, hava teir gloymt.

**Andstøðan til verka**

Tað er líkt til, at bert ein arbeiðaraflokkur er til í Føroyum og at hann fer at hava eitt gott val um fýra mánaðir. Skal Sambandsflokkurin fylgja Javnaðarflokkinum, eigur hann at verja tað, ið virkar. Eisini tað, ið virkar í almenna sektorinum. Sleppið privatiseringini hjá Fólkaflokkinum, ið ikki er baserað upp á útrokningar, men heldur hatur til alt, ið er alment. Hetta mistak má Sambandsflokkurin ikki endurtaka. Lat ikki smákegl oyðileggja gylta møguleikan til komandi løgtingsval. Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin eiga at leggja hetta aftur um og síggja frameftir. Alternativið kenna vit, og meirilutin í Føroyum vrakaði tað so dyggiliga á fólkatingsvalinum.

**Stóru málini ovast á listan**

Av sera stórum týdningi er at hesir ikki snorksova og droyma eins og henda samgongan hevur gjørt, men taka øll forsømd mál til viðgerðar. Skúlaverkið liggur í skeljasorli, sjúkrahúsini eru skammiliga forsømd orsakað av ov lítlari játtan. Deildir eru stongdar 4 mánaðir um árið, tí tær skulu spara. Sjúkrasystrar siga upp, tí umstøðurnar á deildum eru út av lagi vánaligar. Sjúklingar líða undir vánaligu umstøðunum. Mangul er uppá læknar. Skatturin er framvegis alt ov høgur. Pensionistarnir eru sleptir upp á fjall. Heimahjálpin fær súkklur ístaðin fyri bilar osfr.

**Samarbeiði ístaðin fyri konfrontatión**

Stór orka eigur at verða løgd í at fáa normalisera okkara viðurskifti við Danmark, so leingi vit eru í ríkisfelagsskapinum. Vit skulu føra konstruktivan politikk landanna millum. Tað ber til um vilji er til tess. Er eingin vilji, ja, so er einki annað í at velja enn at heita á Kjartan Hoydal, ið bjóðar seg fram at skriva talur og greinar fyri fólk, ið stuðla konfrontatiónspolitikkinum hjá Tjóðveldisflokkinum, men sum mugu hava stuðulspedagog fyri ikki at skaða heilagu sakina. Tað er vorðið sum sjálvrespekt, at lata pennin í annan mans hond. Nýggja landstýrið eigur at brúka blokkin til tað, hann er ætlaður til og ikki til reklamuherferð hjá Tjóðveldisflokkinum. Hesin peningur er ikki ætlaður landsbankanum, men til heilsu/almannaverkið og til skúlaverkið, soleiðis at vit kunnu koma upp á tað støðið, ið restin av ríkinum hevur.

# Uppsøgn

**Landsnevnd Sjálvstýrisfloksins v/ Ronald Poulsen, Tórshavn**



Við hesum geri kunnugt, at eg, frá í dag, havi tikið meg úr landsnevndini.

*Virðisliga*
**Edvard Hermansen**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.